# Viðtøkur fyri foreldraráðið

## Grein 1
## Endamál foreldraráðsins

a. At fremja so væl sum tilber áhugamál foreldranna í samband við leiðara og ansingina.
b. At geva leiðaranum ráð og vegleiðing (sambært grein 9, stk. 1, í dagstovnalógini). Ráðgevingin er ikki bindandi fyri leiðaran. Harafturat skal ráðið arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, barnaansingina og kommununa.

## Grein 2
## Heiti

Foreldraráðið fyri Gjáarlon í Vestmanna Kommunu.

## Grein 3
## Foreldraráðslimir

Í foreldraráðið kunnu veljast øll foreldur ella verjar, sum hava børn í ansing á stovninum.

## Grein 4
## Atkvøðurættur

Foreldur ella verjar hava eina atkvøðu hvør uttan mun til, hvussu nógv børn tey hava í ansing á stovninum.

## Grein 5
## Ráðið

- Leiðarin tekur stig til, at foreldraráðið verður valt.
- Foreldraráðið verður valt á foreldrafundi.
- Foreldraráðslimur verður valdur fyri tvey ár.
- Í foreldraráðnum skulu vera 3-5 limir og ein varalimur fyri hvønn limin. Allar stovur eiga at vera umboðaðar.
- Bæði kynini skulu vera umboðað í foreldraráðnum og ímillum varalimirnar.
- Foreldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni og skrivara.
- Fer barn hjá ráðslimi av stovninum, fer ráðslimurin frá, varalimur tekur við, og nýggjur varalimur verður valdur.
- Foreldraráðið hevur fund í minsta lagi einaferð um ársfjórðingin.
- Foreldraráðið skal taka mál upp, sum foreldur skrivliga leggja fyri ráðið.

- Skrivarin skrivar fundarfrásøgn/gerðabók, sum skal góðkennast og undirskrivast av ráðslimunum eftir fundin ella á fyrstkomandi fundi.
- Ráðslimirnir fáa í mesta lagi eina fundarsamsýning hvønn ársfjórðing, treytað av at fundur hevur verið hildin (sí grein 2, stk. 2, 1) í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini).

**Grein 6**
**Foreldrafundir**

Foreldrafundur er hægsti myndugleiki í øllum viðurskiftum ráðsins.

Foreldrafundurin, sum leiðarin kallar inn til, verður hildin í september við hesi skrá:

a. Frásøgn frá leiðaranum um farna ár.
b. Frásøgn frá foreldraráðnum.
c. Val av limum og varalimum til foreldraráðið.
d. Innkomin mál.
e. Ymiskt.

Foreldrafundur kann eisini verða hildin eftir umbøn foreldranna. Uppskot til fundin skulu vera leiðaranum í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri fundin.

**Grein 7**
**Samráðingar**

Ráðið eigur at vera samráðingarlið ímillum foreldrini, leiðaran og kommununa.

**Grein 8**
**Ábyrgd limanna**

Hvør limur í ráðnum hevur tagnarskyldu - eisini eftir, at hann er farin úr ráðnum.

Vestmanna Kommuna, 17. juli 2008

Karl A. Olsen, borgarstjóri